19. mars 2020

# Corona semja

Hugsandi um serstøku støðuna í Føroyum orsakað av corona virusinum, tekur Kommunala Arbeiðsgevarafelagið undir við semjuni millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar sum eina fyribils semju, ið er galdandi í 1 mánað frá 19. mars 2020 til 15. apríl 2020.

Semjan verður endurskoðað eftir tørvi, sum støðan í landinum broytist.

Verandi sáttmáli er galdandi, við niðanfyristandandi undantøkum:

- Møguleiki er at leingja vaktirnar, so tær í mesta lagi verða 12 tímar, men tá eru seinastu 4 tímarnir at rokna sum yvirtíð. Fyri fastlønt starvsfólk verða hesar 12 tímars vaktir roknaðar soleiðis: Allir arbeiddir tímar fara í normin og tímarnir millum 8 og 12 geva 50% eyka til avspáking ella útgjald.

  Fyri tímalønt verður vaktin roknað soleiðis: 8 vanligar tímar + 4 úrtíðartímar.

- Mest loyvda vikutímatal er 60 tímar íroknað yvirtíð, um ikki annað er avtalað í hvørjum einstøkum føri.

- Undantak verður givið til planlagt úrtíðararbeiði.

- Undantak verður givið til at sjúkrarøktarfrøðingar kunnu flytast millum deildir, har hædd verður tikin fyri førleikum og støðu hjá tí einstaka.

- Sjúkrarøktafrøðilesandi frá eind 1 til 14 fáa 85% av lønartrin 1 í galdandi lønartalvu umframt eftirløn og

  Sjúkrarøktafrøðilesandi í eind 15 og 16 fáa 95% av lønartrin 1 í galdandi lønartalvu umframt eftirløn.

- Hvílitíðin skal ongantíð fara niður sum 8 tímar um døgnið.

| | |
|---|---|
| **Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar** | **Kommunala Arbeiðsgevarafelagið** |